Ítróttar
Sosialurin
Nr. 100 • fríggjadagur • 26. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# HB kann taka oddasessin

**Vinnur HB dystin móti EB/Streymi, er sigursvanda felagið aftur á ovastu rók**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var kanska um eina heldur trilvandi byrjan, tá HB fór ígongd við kappingarárið. Teir tríggir fyrstu dystirnir kastaðu bara trý stig av sær, men síðani hevur bara gingið ein veg – frameftir.

Liðið hevur ikki tapt seinastu seks ferðirnar, og á Toftum fyri viku síðani kom ársins fyrsti útisigur so eisini til høldar. Samanlagt hava úrslitini ført HB somikið langt upp, at teir nú bert eru trý stig frá oddinum. Og við góða málmuninum í huga kann sjálvur oddasessurin tí takast, nú EB/Streymur kemur á vitjan.

### Hagtølini skiftu

Fram til næsta umfarið í vár, so skuldi ein heimadystur móti EB/Streymi ikki verið nakað at óttast hjá HB. Hagtølini staðfestu nevnliga, at EB/Streymur ikki so mikið sum hevði skorað í Gundadali móti teimum reyð/svørtu, men hetta varð broytt við 3-2 sigrinum.

Í HB eru vónirnar kortini góðar, og teir hava eisini alt fólkið tókt til oddabrakið. Seinastu umførini hevur Krzystof Popczynski enntá rokerað eitt sindur við spælarum, soleiðis at møðin ikki skal gera seg galdandi ov tíðliga. Tað merkti millum annað, at Jákup á Borg ikki var vøllinum seinast, men lítið er at ivast í, hann verður millum teir fyrstu ellivu, sum HB-venjarin sendir á vøllin hesaferð.

Hjá EB/Streymi er púra vist, at Leif Niclasen ikki verður við. Hann fekk staðfest beinbrot fyri viku síðani, og tó at ivamál nú er um, hvørt hetta kortini er heilt so álvarsamt, so er neyvan hugsingur hjá honum at spæla hesaferð. Hartil hevur Ronnie Samuelsen ligið sjúkur við onkrum seiglivaðum virus, men vónin er í øllum førum, at hann verður tøkur sunnudagin.



*Talan verður um sannan toppdyst, nú nummar eitt kemur á vitjan hjá nummar tvey í Gundadali*

# Jákup heldur frí í Klaksvík

**B36 er framvegis illa skert, og hjá KÍ er spurningurin, hvør nú skal fáa møguleikan í fremsta plássinum**

KÍ-B36
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Felags fyri KÍ og B36, sum skulu standa fyri fótbóltsundirhaldinum á Norðoyastevnu, er, at tað hevur gingið illa at fingið fulla úrtøku. Serliga á heimavølli, har KÍ hevur vunnið ein av fýra, og B36 hevur vunnið ein av fimm dystum. Hesa ferð er B36 fyri fjórðu ferð á útivølli. Higartil hava teir fingið fult tríggjar ferðir og bara tapt eina ferð – 2-0 í Gundadali móti HB!

Lagið er gott í báðum leguunum. Eftir kleyvarskapin í fjør, tá ið bæði KÍ og B36 vórðu varpað úr steypakappingini, eydnaðist tað báðum liðunum hósdagin at spæla seg í hálvfinaluna. Kanska fer meiri at kennast til steypastríðið í gjár hjá KÍ spælarunum, enn tað fer at gera hjá B36 monnunum. B36 nýtti hálvan annan tíma at kvalifisera seg til hálvfinaluna, meðan KÍ nýtti tveir tímar til sína kvalifikatión.

Stóri spurningurin í Klaksvík er, hvør skal verða fremsti álopsspælarin. Sinisa Jovanovic hevur vikarierað, meðan Paul Clapson hevur verið leikbannaður og meniskskaddur. Eftir reyða kortið hósdagin er Sinisa Jovanovic leikbannaður móti B36. Paul Clapson hevur ikki vant síðani hann fyri viku síðani varð skurðviðgjørdur í knænum.

Ætlanin var, at danski Christian Lundberg skuldi hjálpa til í KÍ álopinum á Norðoyastevnu. Hann kemur tó ikki fyrrenn hósdagin í fyrstu viku. Møguleikar í fremstu røð eru Hjalgrím Elttør, Steffan Kalsø og Kristoffur Jakobsen, sum gjørdi góða reklamu fyri sær sjálvum, tá ið hann hósdagin skoraði tvær ferðir móti GÍ.

Hóast teir í B36 spæla uttan fleiri av teimum, sum hava verið roknaðir at vera lyklaspælarar, so hilnast tað væl. Á Svangaskarði megnaði B36 at vinna 1-0. Jákup Mikkelsen var leikbannaður, og landsliðsspælararnir Ingi Højsted, Fróði Benjaminsen og Bergur Midjord vóru ikki við, tí teir eru skaddir.

Jákup verður leikbannaður móti barndómsfelagnum í morgin, og eingin av omanfyri nevndu skaddu spælarunum verður tøkur.

Hartil er Mikkjal Thomasen eisini leikbannaður. Hann hevur fingið fimm gul kort.

Leikbannini og skaðarnir bera við sær, at ungir spælarar hava fingið møguleikan, og teir hava tikið av. Eitt nú Jóhan V. Gunnarsson og Jóhan Ellingsgaard. Magnus Poulsen er leigaður úr B36 og út á Argir. Treytin er, at hann skal koma í B36 málið at standa, um B36 ikki hevur annan málverja. Magnus vardi B36 málið á Toftum, og hann verður aftur í málinum á Norðoyastevnu.

Norðoyastevnuuppgerðin millum klaksvíkingar og havnarmenn verður klokkan 18.30 leygarkvøldið. So er bert eftir at vóna, at Havnarbáturin og Klaksvíkingur hava róð, áðrenn fyrsta bríksliðið í fótbóltinum verður.

## STUTT SAGT

### Súni skoraði aftur

Súni Olsen hevur rættiliga gjørt um seg á AaB-liðnum, sum stendur seg so væl í Viasat steypakappingini. Sunnudagin spældi AaB fyrru fjórðingsfinaluna ímóti AGF, og AaB vann heili 3-0. Súni Olsen spældi allan dystin á miðvøllinum hjá AaB, og tað var eisini hann, sum setti gongd á málskjótingina. Miðskeiðis í fyrra hálvleiki fekk AaB brotsspark, og tað setti Súni Olsen trygt í málið. Í seinna hálvleiki økti AaB tvær ferðir. Við hesum greiða sigri hevur AaB mest sum spælt seg í hálvfinaluna í Viasat Cup, har vinnandi felagið fær tríggjar milliónir krónur.

**-ek**

### Barcelona gremur seg um ensk feløg

Spanska felagið FC Barcelona heldur lítið um framferðarháttin hjá enskum stórfeløgum, sum leita eftir ungum spælarum í felagnum.

– Vit hava lagt 50 milliónir krónur í okkara ungdómsdeild, men vit hava ein stóran trupulleika av enskum feløgum, sum jagstra okkara ungu spælarar og lokka teir við risastórum peningaupphæddum, sigur Joan Laporta, forseti í Barcelona.

Eitt dømi um ein ungan spælara, sum varð lokkaður burtur frá Barcelona á ungum aldri, er Francesc Fabregas, sum spælir fyri Arsenal.

**-ek**

### Katrin rør í World Cup

Føroyski kapprógvarin í Danmark Katrin Olsen er í hesum døgum við í World Cup kapping, sum verður hildin í Munchen í Týsklandi. Tær fýra kvinnurnar, sum vanliga manna danska léttvektsfýraran, rógva í tveimum bátum til kappingina. Katrin Olsen rør saman við Kiristen Kirk Jepsen, og tær fáa harða mótstøðu, tí sera sterkir rógvarar eru við í kappingini. Kappingin í Týsklandi byrjaði í gjár, og hon heldur fram í dag og í morgin.

**-ek**